# Føroya besta arbeiðspláss

**FAKTA**

**Tilmæli 16 í Sjúkrahúsálitinum**
Felags starvsfólkafyrisiting fyri sjúkrahúsverkið verður sett á stovn, sum, umframt at umsita lønar- og sáttmálaviðurskifti hjá starvsfólkunum, eisini skal arbeiða við at seta skipanir og mannagongdir í verk. Hetta fyri at útvega, gagnnýta, menna og varðveita røttu starvsfólkini í samsvari við tey mál, ið sett eru fyri sjúkrahúsið ella sjúkrahúsverkið í síni heild. Hesin parturin verður eisini nevndur 'Human Ressource Management'



burdi verið tað mest attraktiva arbeiðsplássið í Føroyum.

## Má ikki drukna

Ein HR menning á heilsuøkjunum er alneyðug, heldur Jóhanna Andreasen. Men tað er týdningarmikið, at hetta verður gjørt á rættan hátt.

- Sjúkrahúsverkið hevur verið gjøgnum nógvar sparirundir og umleggingar. Og tá leiðslurnar ongantíð vita, hvussu fíggjarkarmurin sær út næsta ár, er tað kanska ikki so løgið, at tey ikki tora at hugsa stórar tankar innan starvsfólkamenning. Men nýggja starvsfólkadeildin má fáa rúm at arbeiða.

Eik hevur næstan 300 starvsfólk og tveir HR mennarar. Sjúkrahúsverkið hevur umleið 800 starvsfólk, og sjúkrahúsálitið mælir til, at nýggja starvsfólkadeildin fær 2-3 fólk. Sambært HR-mennaranum hjá Eik hevur tað týdning, at minst tvey fólk setast til starvsfólkamenning burturav.

- Um deildin skal taka sær av øllum starvsfólkaøkinum, má ansast ótrúliga væl eftir, at starvsfólkamenningin ikki druknar í umsiting.

## Mobil starvsfólk

Sjúkrahúsálitið viðurkennir, at starvsfólk í dag eru mobil, og at skipanin tí má tryggja, at vitanin hjá starvsfólkunum verður spjadd út. Eisini leggur álitið dent á, at ein týðandi partur av starvsfólkamenningini er at sleppa undan fysiskari og psykiskari niðurslíting av starvsfólkum, so fólk ikki ríma.

Jóhanna Andreasen og Elin Wang eru sjálvar dømi um mobil starvsfólk. Heilsuverkið kappast ikki bara við útlendsk sjúkrahús um arbeiðsmegina, men eisini við privatu vinnuna. Og við ongum arbeiðsloysi í landinum, er kappingin um tey góðu fólkini hørð. Í Eik eru tildømis umleið sjey starvsfólk, sum upprunaliga arbeiddu á almanna- og heilsuøkinum.

Tað er ikki bara í Føroyum, at heilsuverkið hevur starvsfólkatrupulleikar. Elin Wang nevnir sum dømi eitt danskt sjúkrahús, har hon arbeiddi.

– Tá eg hevði verið har í eitt ár, var eg millum tey, sum høvdu verið har longst. Tað manglaðu 15 sjúkrarøktarfrøðingar, og skiftandi vikarar tóku sær av hesum uppgávum. Eingin trivnaður var, og ringt var at varðveita serkunnleikan á deildini.

## Menning og branding

HR menning umfatar millum annað skeiðvirksemi, undirvísng, coaching, at gera karrieruplanir fyri hvørt einstakt starvsfólk, at finna røttu starvsfólkini, at gera profilar av starvsfólkunum, at gera nøgdsemiskanningar o.s.fr.

Human Resource menning setur soleiðis starvfólkatrivnað í hásæti. Og tá leiðslan setir fólk at taka sær av starvsfólkamenning burturav, sendir hon eitt týdningarmikið signal, sigur Jóhanna Andreasen. Starvsfólkini merkja, at leiðslan virðismetir tey, og ynskir at menna og brúka tey á besta hátt. Hetta skapar innanhýsis trivnað og brandar eisini fyritøkuna ella stovnin jaliga úteftir.

Og skal føroyska heilsuverkið útvega og varðveita tey góðu fólkini í framtíðini, er tað, sambært føroysku HR mennarunum, sum Sosialurin hevur tosað við, neyðugt at bøta um bæði trivnað og umdømi.